## DAGSINS MEINING

# Ótrygg læknaviðurskifti

Í mong ár hevur verið trupult at fáa læknar at taka við sum kommunulæknar kring landið. Serliga hevur støðan verið ring í Sandoynni, men tað hevur eisini verið trupult at hava tveir kommunulæknar í sunnaru helvt í Suðuroy í summum tíðarbilum. Eisini onnur læknadømi í tí, vit kunnu nevna útjaðari ella hálvur útjaðari, hava merkt, at tað er ikki lætt at fáa læknar at støðast.

Men nú ger hesin trupulleiki eisini um seg í miðøkjunum, og útlitini eru alt ammað enn tryggjandi fyri Føroya fólk, sum hevur vant seg til og krevur góð lækna- og heilsuviðurskifti. Tá lýst varð eftir kommunulækna herfyri til høvuðsstaðin, søktu bara tveir læknar starvið. Annars hevur áður verið rættiligur gravgangur eftir at fáa læknastarv í Havnini.

Sambært útvarpinum hevði læknin, sum settur er í høvuðsstaðnum, fingið annað starv í Eysturoynni, sum sostatt manglar ein lækna. Tað sama ger seg galdandi í sunnaru helvt í Suðuroy og í Norðoyggjum eru tvey størv ikki sett. Harafturat kann leggjast, at fleiri av læknunum hava ikki nógv ár afturat, og upplýst er, at eingin føroyingur tekur útbúgving sum kommunulækni í løtuni.

Tí kann staðfestast, at støðan er alt annað enn góð. Kravið má tí verða, at lansdsmyndugleikarnir viðgera henda álvarsspurning saman við læknafelagi, kommunum og øðrum avvarðandi beinanvegin. Vit kunnu ikki liva við, at sætta hvørt kommunulæknastarv ikki er sett. Støðan má greinast út, so vit fáa at vita, hvat bagir. -Eru tað arbeiðsviðirskifti, lønarviðurskifti, vantandi áhugi vegna vantandi faklit umhvørvi ella hvat!

Seinastu árini hava vit tosa nógv um at menna útoyggjar og útjaðara. Men ein fyritreyt fyri, at fólk støðast í útjaðaranum er, at læknaviðurskiftini eru góð og trygg, og tað eru tey ikki sum er!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Marita hevur sett varandi spor eftir seg.

**Høgni Hoydal**
*form. í Tjóðveldisflokkinum*



Við stórari sorg og skelki havi eg burturstaddur í útlondum frætt boðini um deyða Maritu Petersens.

Tankarnir leita sjálvsagt fyrst og fremst til Kára, synirnar og øll tey næstu, ið hava mist so nógv so brádliga. Vónandi finna tit styrki í minnunum, sum ongantíð fara.

Javnaðarflokkurin og tann politiska rørslan, sum Marita vígdi so stóran part av sínum lívi, sínum eginleikum og sínari orku til, hevur mist ein vita og eitt bæriligt og sannførandi oddafólk.

Føroyska tjóðin hevur við deyða Maritu mist ein stórt menniskja og ein slóðbrótandi politikara.

Marita tók ábyrgd undir teimum mest truplu umstøðunum, sum nøkrum politikara og løgmanni hevur fyri. Øll, ið vilja skilja føroyska samtíðarsøgu kunnu ásanna, at allar skorur vórðu tiknar undan og allir garðar fullu, sum vanliga kunnu styðja. Eisini myndugleikar og embæti, sum álit átti at kunnað setast á. Kortini megnaði hon at standa á báðum beinum og reisa nýggjar varðar eftir seg.

Tjóðveldispolitikarar, ið samstarvaðu og tóku tøk saman við henni, eru takksom og hava djúpa virðing fyri persóninum og politikaranum Maritu Petersen.

Marita Petersen hevur skrivað søgu sum Føroya fyrsta kvinna í løgmansembætinum. Hon framdi týdningarmiklar broytingar í føroyskari lóggávu og stendur sum ein hugsjónarkvinna fyri eftirtíðina.

Nú Marita er farin, fara sporini, ið hon setti eftir seg at liva víðari í komandi ættarliðum.

Vegna Tjóðveldisflokkin vil eg lýsa okkara djúpastu samkenslu við tykkum sum eftir sita og lýsa frið yvir minnið um Maritu Petersen.

# Stop »Israels« krig??

**Eyðun Jacobsen**

Bert ein stutt viðmerking til Leif Jacobsen.

Skilji eg Leif Jacobsen rætt so er bert ein syndabukkur í kreppuni í Miðeystri og hesin syndabukkurin er Ísrael. Tað er Ísrael sum torturerar tað Palestinska fólki, tað er Ísrael sum undirkúgar tað Palestinska fólki og tað hevur tað gjørt nú í 50 ár og so verað fleiri dømir nevnd um hvussu Ísrael undirkúgar og so ikki at gloyma »torturbøðilin« Gillon sum nú er Ísraelskur sendiharri í Danmark.

Gillon hevur verið avhølvaður tað seinastu tíðina vegna eitt úttalilsi um, at tað onkuntíð kundi verað neyðugt at brúka fysiskan harðskap fyri at fáa PLO fólk at tala satt, og so var alt á gosi, Gillan skuldi handtakast tá ið hann steig fótin á danska jørð, hann skuldi fyri mannarættindadómstólin, han skuldi straffast og tað hart eisini.

Stutta tíð áðrenn hetta steig ein annar maður fótin á danska jørð og tann reyði leyparin bleiv rullaður út.

Hesin maðurin hevur tey seinastu 30 árini verið orsøkin til at fleiri túsund ísraelarar hava latið lív.

Hesin maðurin hevur so nógv blóð á hondunum at tað kann farva nógvar útrullaðar leyparar reyðar.

Hesin maður eitur Yassir Arafat, hann hevur bert eitt mál og tað er at forkoma øllum jødum og landið teirra. Hvussu ger hann tað, jú hann brúkar sera menniskjaligar háttir, hann sendir ungar menn inn í bussar, inn í diskotek, inn í pizzabarrir og líknandi støð, hesir hava beltið, fylt við bumbum, um miðuna, tá ið teir koma inn á hesi støðini so útloysa teir bumburnar og óskyldig einkivitandi menniskju blíva sprongd í stumpar og stykkir. Er tað nakar sum tosar um at stilla harra Arafat inn fyri ein dómstól??? Nei, tann reyði leyparin verður rullaður út, og Arafat kann vaska sínar blóðigu hendur.

Minst til Leif Jacobsen at tað eru tveir partar sum stríðast, men tað kritiska eyga er meiri vent ímóti Ísrael enn ímóti PLO.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



# Best at flyta longur út á fjørðin

**Landsverkfrøðinguri n hevur mælt til at leggja tað nýggju samferðsluhavnina á Tvøroyri ein slakan kilometur uttanfyri havnina á Drelnesi**

SUÐUROYARSIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*



*Sum tað sæst, hevur Landsverkfrøðingurin gjørttvey uppskot um, hvar nýggja samferðsluhavnin á Tvøroyri skal vera. Ein loysn er at gera ein mola út frá havnini á Drelnesi. Ment tann frægara loysnin er at gera mola og nýggja havn eina 800 metrar longur úti á fjørðinum, uti á Langabakka, beint innanfyri Lítluhólmar. Sum tað sæst, fer skipið at liggja út og inn í báðum førum*

Gongur sum Landsverkføðingurin mælir til, verður tann nýggja samferðsluhavnin á Tvøroyri gjørd ein slakan kilometur uttanfyri Havnina á Drelnesi.

Tað er i øllum førum greitt, at munandi ábøtur mugu gerast á havnaløgini í Suðuroy, tá ið nýggja suðuroyarskipið kemur, í 2004.

Í Vági er trupulleikin ikki so stórur, tí har verður farið undir havnaútbygging fyri einar 20 milliónir kortini og samferðsluhavnin verður gjørd sum ein partur av tí.

Øðrvísi er á Tvøroyri, tí har fer tann nýggja samferðsluhavnin at kosta einar 50-75 milliónir.

Landsverkfrøðingurin hevur kannað umstøðurnar á fjørðinum og hevur latið Vinnumálastýrinum eitt tilmæli um, hvat skal gerast, saman við eini skitsutekning.

Arbeitt verður við tveimum loysnin.

Onnur er at byggja havnina á Drelnesi út og at gera ein mola út á fjørðin til ta nýggja skipið. Hetta er ein losyn sum fer at kosta einar 50 milliónir.

Hin loysnin er at gera eina nýggja havn ein slakan kilometur eystanfyri Drelnes, hetta fer at kosta umleið 75 milliónir.

Sjálvur mælir Landsverkfrøðingurjn til tað seinnu loysnina, tí teir halda, at tað verður ein betri havn og tað fer kanska enntá eisini at gera havnina á Drelnesi betri.

Harafturat kemur, at Havnin á Drelnesi er kommunal, sum kommunan hevur at ráða yvir og Tvøroyrar Kommuna hevur fyrr ætlað at taka havnina til annað virksemi.

Verður nýggj samferðsluhavn bygt, slepst eisini undan tí vansanum, at havnin verður tikin til onnur endamál enn til samferðsluhavn, sigur Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur.

Hann sigur, at plássið, har landsverkfrøðingurin mælir til at gera tað nýggju havnina, er á Langabakka, beint innanfyri Lítluhólmar, einar 800 metrar longur úti á fjørðinum enn havnina á Drelnesi er.

Hann sigur, at modelroyndir verða nu gjørdar og tær fara so at vísa akkkurát hvar tað fer frægast at leggja nýggju havnina. Tað kann tí henda, at hon verður flutt inneftir ella úteftir, alt eftir, hvar modelroyndirnar vísa, at tað er best at leggja hana.

### Ikki í Tjaldavík

Annars hevur ein av manningini á Smyrli, Petur Dahl Nolsøe, mælt til at leggja nýggju samferðsluhavnina í Tjaldavík, sum er heilt úti á fjørðinum.

Hann vísti á, at Tjaldavík var natúrhavn burturav og at hetta hartil fór at kappa fleiri tað mesta av einum hálvum tíma at siglingartíðini ímillum Havnina og Suðuroynna. Samstundis er hetta at kalla mitt í Suðuroynni.

Men hesum er Landsverkfrøðingurin ikki samdur í.

Oyvindur Brimnes sigur, at tað er ov trongt at gera havn á Drelnesi. Slættlendið uttanum er lítið, so tað verður eisini trupult at gera veg til Havnina og at gera keipláss til bilarnar.

Harumframt høvdu friðingarmyndugleikarnir eisini komi upp í málið, um ætlanin hevði verið at gjørt havn á Drelnesi, sigur Oyvindur Brimnes.

# Noyðist kanska at sigla til Vágs í fyrstuni

**Bæði landsstýrismaðurin í vinnumálum og tann í fíggjarmálum, siga, at tað kann gerast neyðugt hjá nýggja Smyrli at sigla til Vágs burturav ta fyrstu tíðina eftir at hann er komin**

SUÐUROYARISGLINGIN
*Áki Bertholdsen*


*Ætlanin er, at nýggja suðuroyarferjan skal vera liðug í 2004. Men tað er ikki samferðsluhavnin á Tvøroyri, sum skal taka ímóti skipinum, verður liðug tá*

Tað er ikki vist, at tað fer at bera til at gera nýggju samferðsluhavnina í Suðuroy lidna til 2004, tá ið tað nýggja suðuroyarskipið verður sett í sigling.

Teir báðir fremstu landsstýrismenninir á økinum, tann í vinnumálum og tann í fíggjarmálum, siga, at tað er ikki vist, tað tað fer at bera til at fáa roknistykkið at ganga upp, soleiðis, at nýggja ferjulegan á Tvøroyri verður liðug til tíðina.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, sigur, at tað verður neyðugt at hava eina havn í Suðuroy, so at nýggi Smyril fær ligið væl og trygt í øllum veðri.

Karsten Hansen, landsstýrismaður er púra samdur og heldur, at tað hevur onga meining ikki at tryggja nýggja Smyrli eina góða havn í Suðuroynni at liggja í.

Hvussu leingi hetta kann vera, er óvist, men báðir nevna teir eitt tíðarskeið uppá nakrar mánaðir til eitt ár ella so.

### Skal til

Bjarni Djurholm vísir á, at nýggja Suðuroyarskipið er mett at kosta 305 milliónir krónur. Mett verður at 100 milliónir skulu brúkast til skipið um árið tey trý árini frá 2002 til 2004, bæði árini íroknað.

Men harafturat verður neyðugt at gera nýggja samferðsluhavn á Tvøroyri, og tað fer at kosta ímillum 50 og 75 milliónir, alt eftir, hvør loysn verður vald.

Bjarni Djurgholm sigur, at bæði Strandferðslan, Landsverkfrøðingurin og umsitingin í Vinnumálastýrinum, hava mælt, til at nýggja samferðsluhavnin verður bygt so at hon verður liðug, samstundis, sum nýggja ferjan verður liðug.

Harafturat hevur Løgtingið samtykt, at Smyril eisini skal sigla á Vág og til tað krevst eisini ein útbygt havn har. Men har ætlar Vágs Kommuna at byggja út kortini og ætlanin er at gera samferðsluhavnina sum ein part av tí.

Tað er ein útbygging, sum er væl bíligari enn tann á Tvøroyri, tí útbyggingarnar í Vági kosta bara gott 20 milliónir tilsamans, við samferðsluhavn og ídnaðarhavn við. Men landið skal eisini betala ein part av tí.

Sostatt fara útbyggingarnar í Suðuroy at kosta um 360-380 milliónir tilsamans frá 2002 til 2004 og tað er meiri enn helvtin av samlaðu íløgukvotuni upp á umleið 200 milliónir um árið.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur mælt til, at samferðsluhavnin á Trongisvágsfirði verður gjørd soleiðis, at hon verður liðug samstundis sum nýggi Smyril verður liðugur.

Men hann viðgongur eisini, at íløgukarmarnir eru so trongir, at tað er ikki vist, at tað eydnast.

– Eydnast tað ikki, mugu vit góðtaka, at Smyril fer at brúka Vág til samferðsluhavn og at sigla har burturav tað fyrstu tíðina, kanska í nakrar mánaðir.

Men hann leggur dent á, at Vágur verður ikki tann endaliga samferðsluhavnin í Suðuroy.

### Ikki tann stóra gølan

Karsten Hansen, landstýrismaður heldur, at tað verður ikki tann stóra gølan, um tað verður neyðugt hjá Smyrli at brúka Vág til samferðsluhavn tað fyrstu tíðina, um tað so skuldi verðið í eitt ár.

–Tað, sum hetta fyrst og fremst snýr seg um, er at fáa tað nýggju Suðuroyarferjuna smíðaða.

Men tað má ikki henda, at skipið ikki fær ligið í Suðuroynni, so tað fara vit eisini at skapa útvegir fyri.

– Men eydnast tað ikki at fáa havnina á Tvøroyri liðuga til tíðina, mugu suðuroyingar tola, at hann siglur á Vág tað fyrstu tíðina. Men tað verður so bara ein neyðloysn, sum verður í gildið í eina tíð, sigur Karsten Hansen.